# Bilar

Nr. 145 • hósdagur • 4. august 2005 • 79. árg.


## Alfa Romeo 159 1,9 JTS

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin: | 1,9 litur 4 syl. bensin 160 hk | Stødd og vekt | |
| 0-100 km/t: | 9,7 sek | Longd | 446,0 cm |
| Bensinnýtsla: | 11,5 km/l | Breidd | 183,0 cm |
| Dekkstødd: | 205/55-16- | Hædd | 142,0 cm |
| | | Eginvekt | 1.425 kg |
| | | Viðførisrúm | 405 litrar |
| | | Prísur: | kr. (uml. 400.000,- í Danmark) |

# Alfa Romeo 159 avloysir 156








*Alfa Romeo 159 er ein eyðkendur Alfa við ektaðum sportsligum italskum designi bæði uttan og innan*



**Eftir sjey árum á marknaðinum verður Alfa Romeo 156 nú avloystur av einum heilt nýggjum 159. Bilurin er designaður í Italia í samstarvi millum Alfa Romeo Styling Centre og designaran Giorgetto Giugiaro**


BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*


Hóast vit ikki síggja nógv til italsku Alfa Romeo her hjá okkum, er talan um eitt fínt bilmerki, ið er kent fyri sínar dygdir sum t.d. design, motorkraft og góðar sportsligar koyrieginleikar, og hesin nýggi Alfa Romeo 159 er einki undantak.

Bilurin hevur flott design bæði innan og uttan og koyrieginleikar í topp-klassa.

Bilurin er designaður í Italia í samstarvi millum Alfa Romeo Styling Centre og designaran Giorgetto Giugiaro. Alfa Romeo 159 skal kappast við bilar sum t.d. 3-seriuna hjá BMW og Audi A4.

Alfa Romeo 159 avloysir 156, men hesin nýggi er ein munandi størri og rúmilgari bilur.

Fimm ymiskir motorar verða at velja í millum, tríggir bensin og tveir diesel. Bensinmotorarnir eru: 1,9 litur 4 syl. við 160 hk, 2,2 litur 4 syl. við 185 hk og ein 3,2 litur V6 við 260 hk. Dieselmotorarnir eru: 1,9 litur 4 syl. við 150 og 2,4 litur 5 syl. við 200 hk. Sum tað sæst á motor-skránni, er talan um stórar motorar við góðari kraft.

Í mars 2006 kemur Alfa Romeo 159 sum station-vognur undir navninum Sportswagon.

Umframt hendan 159 hava Alfa Romeo fleiri onnur modell í síni skrá sum t.d.: Alfa Romeo 147, GT, GTV, Spider og 166.



*Modellskráin hjá Alfa Romeo byrjar við 147, ið er ein bilur í sonevnda Golf-klassanum. Allir Alfa hava eyðkenda kølaragittari, ið fer niður ímillum forkúfangaran*



*Hesin Alfa Romeo GTV við 3,2 litur V6 motori og 240 hk er ein tann kvikasti Alfa. Hann koyrir frá 0-100 km/t upp á 6,3 sek*



*Alfa Romeo 166 er tann størsti Alfa og toppmodellið. Ein veruligur luksus sportsbilur - eisini við 3,2 litur V6 motori við 240 hk*